HEILSUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS

# Kunning um heilsutrygdargjald

Í vikuni fer TAKS at krevja inn nýtt heilsutrygdargjald frá øllum føroyingum. Nýggja gjaldið kemur ístaðin fyri gamla sjúkrakassagjaldið, sum varð avtikið um ársskiftið.

Heilsutrygdargjaldið er eins fyri øll, 245 krónur um mánaðin, og verður tikið inn umvegis skattaskipanina. Børn undir 18 ár gjalda einki.

Fyrstu ferð verður goldið fyri bæði januar og februar mánað 2010.

Tey, ið ikki kunnu gjalda beinleiðis umvegis skattaskipanina, fáa inngjaldingarkort sendandi frá TAKS. Fyrsta inngjaldingarkortið verður sent tann 20. apríl.

Spurningar um heilsutrygdargjaldið kunnu setast skrivliga til TAKS.

TAKS, Postrúm 2151, Kvíggjartún 1,
165 Argir, taks@taks.fo.
Brævið skal viðmerkjast
»Heilsutrygdargjald«.

Heilsutrygd er nýggj almenn heilsutrygdarskipan, ið tann 1. januar 2010 avloysti gomlu skipanina við 11 sjúkrakassum kring landið. Endamálið við nýskipanini er at tryggja øllum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum



Sosialurin / KvR 34 18 00

HEILSUMÁLARÁÐIÐ · EIRARGARÐUR 2 · 100 TÓRSHAVN · TEL 30 40 50 · FAX 35 40 45 · HMR@HMR.FO · WWW.HMR.FO

---

FJARHITAFELAGIÐ - HITAMIÐSTØÐ Í HOYVÍK

## Undangóðkenning av høvuðsarbeiðstøku

Í sambandi við 1. byggistig í verkætlanini at byggja fjarhitamiðstøð í Hoyvík verður við hesum boðið til undangóðkenning av arbeiðstakarum at geva tilboð uppá høvuðsarbeiðstøku.

**Verkætlanin:**
Hitamiðstøðin verður tilsamans 1254 bruttofermetrar. Herav er 348 fermetrar ketilhøll, 564 fermetrar verkstaður og skrivstovuhølir og 342 fermetrar yvirdekkaðar útigoymslur. Av samlaðu verkætlanini er ætlanin at byggja 850 fermetrar í 1. byggistigið.

Ætlanin er at byrja byggiarbeiði í mai 2010

**Høvuðsarbeiðstøkan:**
Høvuðsarbeiðstøkan skal fevna um allar fakarbeiðstøkur í sambandi við bygging av hitamiðstøðini. Fakarbeiðstøkurnar eru:

- Jørðarbeiði
- Lendisarbeiði
- Kloakkarbeiði
- Betongarbeiði
- Stálarbeiði
- El-arbeiði
- Múraraarbeiði
- Málaraarbeiði
- HVS-arbeiði
- Ventilatiónsarbeiði
- Timbur og snikkaraarbeiði
- Gólvleggingararbeiði

**Treytir:**
Áhugaðir høvuðsarbeiðstakarar fáa meira at vita um kravdar upplýsingar, treytir o.a. á heimasíðuna hjá Fjarhitafelagnum www.fjarhiti.fo. Fylg leinkjuni »Undangóðkenning av arbeiðstakarum at geva tilboð uppá bygging av Hitamiðstøð«.

**Freist:**
Áheitan um undangóðkenning skal sendast til Selmar Nielsen Arkitektur Spf, Landavegur 9, Tórshavn, og verða okkum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 18 mars 2010.**

Eru spurningar, ber til at ringja á tlf. 354812 ella 210818.

Sosialurin / KvR 34 18 00

**Ráðgevarar:**

Selmar Nielsen Arkitektur Sp/f

Pf. Sofus M. Jakobsen
Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.

LBF Ráðgevandi verkfrøðingar

SP/F KJ ELRÁÐ
Ráðgevandi verkfrøðingar

---

## Stjóraskifti á Havstovuni
## Almenn móttøka



### Almenn móttøka verður á Havstovuni fríggjadagin 26. februar, kl. 15⁰⁰ - 17⁰⁰

Í sambandi við at Hjalti í Jákupsstovu fer frá sum stjóri á Havstovuni og Eilif Gaard tekur við stjórastarvinum, bjóðar Havstovan til almenna móttøku.

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

**Hjalti í Jákupsstovu**
hevur verið stjóri á Havstovuni síðani 1988, og hevur sostatt røkt stjórastarvið í 22 ár, nú hann fer frá fyri aldur.

**Eilif Gaard**
er doktari í havlívfrøði og hevur starvast á Havstovuni síðani 1987.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo